# Fólk noyðast at bíða longri eftir hjálp

**Í fleiri ár hevur Almannastovan stríðst fyri at kunna geva fólkið eina betri tænastu, men nú er alt fullkomiliga fallið til jarðar**

ALMANNASTOVAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Nú fer tað at taka nógv longri hjá fólki at fáa hjálp frá Almannastovuni.

Tað er ein avleiðing av teimum sparingunum, sum landsstýrið nú ætlar at seta í verk á Almannastovuni

Sosatt ætlar landsstýrið at seta sparingar í verk, sum raka tey veikastu í samfelagnum.

Í sambandi við fíggjarlógina fyri næsta ár, ætlar landsstýrið at játtað Almannastovuni so mikið lítið av peningi, at tað verður neyðugt at siga seks-átta fólkum úr starvi.

– Hetta er í veruleikanum ein rættiliga stór sparing, sigur Birgit Christiansen, sum er álitisfólk á Almannastovuni.

Hon vísir á, at í Havnini eru tey eini 70 fulltíðarstørv, so talan er um eina sparing ið nærkast 10%.

Og hon sigur, at hetta fer at fáa stórar avleiðingar fyri virksemið hjá Almannastovuni.

Hon vísir á, at Almannastovan hevur verið illa undirmannað frammanundan.

– Vit hava verri enn so havt tað starvsfólkatalið sum skal til fyri at kunna geva viðskiftafólki okkara ta tænastu, sum vit halda, at tey eiga at fáa frá okkum.

– Í løtuni er støðan tann, at fleiri deildir á Almannastovuni als ikki klára at røkja sína uppgávu og sum tískil hava ógvuliga trupult við at avgreiða tey mál, tey fáa til viðgerðar.

– Og tað er ongin ivi um, at verða ætlaðu sparingarnar nú settar í verk afturat, fer tað at taka munandi longri tíð hjá Almannastovuni at avgreiða umsóknir frá fólki um hjálp, sigur hon.

Í hesum sambandi kann viðmerkjast, at Almannastovan hevur áður fingið átalu frá sjálvum Løgtingsins Umboðsmanni, júst tí hon er so sein at avgreiða mál.

### Fullkomiliga fallið til jarðar

*– Nú sparingar skulu setast í verk, fer tað at taka munandi longri tíð hjá Almannastovuni at avgreiða umsóknir frá fólki um hjálp, sigur Birgit Christiansen, álitisfólk*

Í fleiri ár hevur Almannastovan annars arbeitt við at leggja bygnaðin um við tí endamáli at kunna veita borgarum eina betri tænastu.

– Verða hesar sparingarnar settar í verk, er alt tað arbeiðið fullkomiliga fallið til jarðar, sigur Birgit Christiansen.

Hon sigur, at í høvuðsheitum eru tað málsviðgerarar, sum verða sagdir úr starvi og tað fer at fáa stórar avleiðingar fyri avgreiðslutíðina.

Samstundis vísir hon á, at metingarnar vísa, at tíðirnar kanska fara at versna eitt sindur nú.

– Og tað er júst í verri tíðum, at tað er enn meiri brúk fyri Almannastovuni. Birgit Christiansen sigur, at frammanundan er støðan á Almannastovan tann, at fleiri starvsfólk føla, at tey strekkja ikki til.

– Og tað eru eisini starvsfólk, sum í ár hava tikið sær tær vánaligu arbeiðsumstøðurnar so nær, at tey hava sagt upp, uttan at hava annað arbeiði at fara til.

– Starvsfólkið á Almannastovuni hevur við menniskju at gera og tað eru mangan svárir trupulleikar, sum hesi menniskjuni hava at dragast við. Tí er tað ómetaliga tyngjandi fyri starvsfólki, táið tey føla, at tey ikki megna at hjálpa hesum fólkunum so væl, sum tey eiga.

Og bara í ár hevur hetta havt tær avleiðingar fyri nøkur starvsfólk, at tey heldur eru sjálvboðin farin út í arbeiðsloysi, enn at at tey hava orkað at hildið fram at arbeiða undir so vánaligum umstøðum, sum Almannastovan hevur at bjóðað, tí tey klára ikki at liva við tí.

– Og nú enn fleiri sparingar skulu setast í verk, verður støðan enn verri, so tað sær alt annað enn gott út.

Birgit Christiansen leggur afturat, at tað undrar hana almikið, at tað júst er ein samgonga við javnaðarflokkinum á odda, ið tekur stig til so stórar sparingar á Almannastovuni, tí er tað nakar flokkur, ið hevur sosiala trygd og umsorgan fyri teimum veiku, ovast í sínum skjøldri, er tað júst javnaðarflokkurin.

Í sæð í hesum ljósinum eru sparingarnar eitt vónbrot hjá álitisfólkinum á Almannastovuni.

Og kortini hevði hon ikki væntað annað, tí hon heldur at politiskt hevur tað ligið í kortunum, at tað skuldi sparast.

– Og politikarar plaga ikki at kanna eftir, hvar tað ber til at spara og, hvar tað ikki ber til. Teir spara yvir ein kamb við sláimaskinuni og so er tað liðugt.

### Sparingar lagdar saman

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum, sigur, at tað hóvar honum illa at spara hjá Almannastovuni, men at hon má taka sín part av sparingunum, sum verða gjørdar allastaðni á fíggjarlógini.

Men hann sigur eisini, at sparingarnar hjá Almannastovuni næsta ár eru 838.000 krónur, men tað, sum er hent, er, at sparingar, sum áttu at verið framdar í ár, eru skumpaðar fram til næsta ár og tí verður talan um at siga 6-8 fólkum úr starvi.

Vit hava meiri frá Landsstýrismanninum um Almannastovuna í blaðnum í morgin.

# Borgarstjórin á Tvøroyri skiftir hest

**Kristin Michelsen er kendur sum tjóðveldismaður, men á býráðsvalinum hesuferð, stillar hann upp á javnaðarlistanum**

BÝRÁÐSVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Gamli tjóðveldismaðurin, Kristin Michelsen vil ikki siga um hann nú er blivin javnaðarmaður av álvara, ella um tað bara er til býráðsvalið. Her situr hann við borðendan á seinasta býráðsfundi, høgrumegin*

Tað er nú greitt, at borgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, fer at stilla upp fyri javnaðarflokkin á býráðsvalinum, sum verður í næsta mánaði.

Sostatt hevur býráðsvalið á Tvøroyri fingið eina heilt óvæntaða vend. Tí hóast Kristin Michelsen stillaði upp á einum uttanflokkalista á seinasta býráðsfundi, hevur hann altíð verið kendur sum tjóðveldismaður.

Men tá ið javnaðarflokkurin á Tvøroyri hevði uppstillingarfund týdskvøldið, kom bræv frá Kristin Michelsen, har hann meldaði seg inn í javnaðarfelagið og bjóðaði seg samstundis fram sum valevni til býráðið.

Hesum tilboði tóku javnaðarfólk av og Kristin Michelsen er sostatt komin á javnaðarlistan.
Sjálvur sigur Kristin Michelsen, at hann mestsum hevði gjørt av, at hann skuldi ikki stilla uppaftur á býráðsvalinum hesuferð.

Men seinnapartin týsdagin tók hann so endaliga avgerð um at stilla upp kortini, men at tað skuldi vera á javnaðarlistanum.

Hann vil onki siga um orsøkina til, at hann er farin upp á javnaðarlistan.

– Tað er av persónligum orsøkum, sigur hann.

Men hann leggur afturat, at hann hevur havt gott samstarv við javnaðarflokkin í samgonguni í Tvøroyrar Býráð í hesum valskeiðnum.

Vit hava annars fingið at vita, at hann hevði fingið áheitan um at stilla upp á tjóðveldislistanum til býráðsvalið.

Men tað hevur hann als onga viðmerking til.

Hann hevur heldur onga viðmerking til, um hann eisini ætlar at stuðla javnaðarflokkin á einum komandi løgtingsvali.

– Her er talan um eitt býráðsval og tað hevur als onki við eitt løgtingsval at gera. Eg havi ongantíð tosað um partapolitikk í býráðnum og tað ætli eg mær heldur ikki at gera nú ella frameftir, sigur Kristin Michelsen.

Hann hevur heldur onga viðmerking til um hann nú er blivin javnaðarmaður av álvara, ella um hann bara er javnaðarmaður á býráðsvalinum.

### Kend valevni við

Sostatt kann staðfestast, at royndirnar at gera ein felags lista til býráðsvalið á Tvøroyri hesuferð, er miseydnað.

Annars hevur javnaðarflokkurin 11 valevni til býráðsvalið á Tvøroyri hesuferð.

Av teimum eru níggju mannfólk og bara tvey konufólk.

Onkur kend valevni er aftur á listanum hesuferð. Gamli Sverri Midjord bjóðar seg fram einaferð afturat og tað ger ein annar býráðslimur hjá javnaðarflokkinum, Pauli Einarsson, eisini.

Hinvegin hevur triði býráðslimurin hjá javnaðarflokkinum í Tvøroyrar Býráð, Heri Mortensen, gjørt av at hann stillar ikki uppaftur.

Hini valevnini á javnaðarlistanum til býráðsvalið á Tvøroyri, eru, Hans Sørensen, Poul Olsen, Anthon Johannesen, Marni Olsen, Páll Michelsen, Jens Johannesen, Jonhild Nielsen og Heidi Mortensen.



# Undirsjóartunnil fyri listaskúla

**Tinglimurin hjá Javnaðarflokkinum úr Sandoynni, Gerhard Lognberg, góðtekur, at játtanin til Lista- og tónleikaskúla á Sandoynni er strikað á fíggjarlógini fyri komandi ár. – Jú hatta er í ordan, tí vit fáa ein undirsjóartunnil og ítróttahøll í staðin, og tað raðfesti eg hægri enn ein listaskúla, sigur Gerhard Lognberg**

FÍGGJARLÓGIN 2005
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Fólk á Sandoynni hava størri brúk fyri einum undirsjóartunli og ítróttarhøll enn einum listaskúla, heldur javnaðartingmaðurin, Gerhard Lognberg*

*Mynd: Savnsmynd*

Í fíggjarlógaruppskotinum hjá landsstýrinum fyri komandi ár er eingin játtan sett av til Lista- og tónleikaskúla Føroya, sum ætlanin er at byggja á Sandoynni. Á fíggjarlógini fyri 2004 vórðu 500.000 krónur settar av til Listaskúlan, men samgongan hevur gjørt av strika játtanina til komandi ár.

Gerhard Lognberg er samgongulimir og valdur á Sandoynni, og hann tykist ikki at hava ligið í andvekri, síðan játtanin til Listaskúlan á Sandoynni varð strikað.

– Jú hatta er í ordan, tí vit fáa ein undirsjóartunnil og ítróttahøll í staðin, og tað raðfesti eg hægri enn ein listaskúla. Tað ber ikki til at fáa alt, og tí kemur listaskúlin í aðru røð, sigur Gerhard Lognberg.

Samgongan hevur sett 500.000 krónur til fyrireikingararbeiðið av undirsjóartunnilinum til Sandoynna á fíggjarlógina fyri 2005, og Gerhard Lognberg væntar eisini, at sandoyingar fáa ein part av játtanini, ið samgongan hevur sett av til at byggja nýggjar ítróttahallir fyri komandi ár.

– Fólk á Sandoynni hava størri brúk fyri einum undirsjóartunli og ítróttahøll enn einum listaskúla í løtuni, heldur javnaðartingmaðurin

### Óvist við listaskúla

Hóast eingin játtan er sett av til Lista- og tónleikaskúla Føroya komandi, væntar Gerhard Lognberg kortini ikki, at ætlanin dettur fullkomiliga niðurfyri. Hann dugir kortini ikki at siga, nær farið verður undir arbeiðið, og útihýsir ikki, at tað kann taka fleiri ár.

– Ein listaskúli kemur at kosta góðar 50 mió. krónur tilsamans, og í løtuni raðfestir samgongan undirsjóartunnilin og ítróttahøllina hægri, og tí fer tað óivað at taka fleiri ár, áðrenn farið verður undir listaskúlan, sigur Gerhard Lognberg.

## Illviljin staðfestur

**Tinglimurin hjá Tjóðveldisflokkinum á Sandoynni, Páll á Reynatúgvu, er ikki bilsin av avgerðini hjá samgonguni um at strika játtanina til Lista- og tónleikaskúlan á Sandoynni. – Samgongan hevur alla tíð havt illvilja ímóti ætlanini, sigur hann**



FÍGGJARLÓG 2005
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Sandoyartingmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum, Páll á Reynatúgvu, er ikki bilsin av avgerðini hjá samgonguni um at strika játtanina til Lista- og tónleikaskúla Føroya á fíggjarlógaruppskotinum fyri komandi ár.

– Avgerðin er burturvið, men hetta er eisini staðfesting av illviljanum hjá samgonguni fyri ætlanini, so fyri so vítt er einki broytt, sigur Páll á Reynatúgvu.

Tjóðveldistingmaðurin greiðir frá, at í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 vat heldur eingin játtan til skúlan, men undir fíggjarnevndarviðgerðini var tað hann sjálvur, ið fekk játtanina á 500.000 krónur til Listaskúlan á endaligu fíggjarlógina

### Einki hendir

Páll á Reynatúgvu sigur seg ivast stórliga í um nakað fer at henda í málinum um Lista- og tónleikaskúla Føroya, tí samgongan tykist vera støðuføst í málinum.

Hann vísir á, at hóast 500.000 krónur eru settar av, hevur hann ikki fingið nakra ábending frá landsstýrismanninum, Jógvani á Lakjuni, um, at hann ætlar nýta peningin.

Spurdur, um hann ætlar aftur í ár at strongja á í fíggjarnevndararbeiðinum fyri at fáa eina játtan til Listaskúlan á fíggjarlógina, svarar Páll á Reynatúgvu, at tað er ætlanin, men so má hann eisini fáa vissu fyri, at glið kemur á málið, og at landsstýrið ger veruleika av ætlaninum um at byggja skúlan.

# Kristian heldur fast

**Formaðurin í tingbólki Javnaðarfloksins, Kristian Magnussen, heldur framvegis, at tað er skeivt at veita ein skattalætta komandi ár, hóast samgongan er komin ásamt um tað í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2005. -Eg havi roynt at gjørt vart við míni sjónarmið í samgonguni, men eg fái ongan stuðul, og tá er ikki nógv, eg kann gera, sigur Kristian Magnussen**

SKATTALÆTTIN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*–Vit eru noydd at stinga fingurin í jørðina og ásanna, at búskaparliga støðan er ikki hin rætta til at veita ein skattalætta, og hóast eg havi roynt at greiða hinum samgongulimunum frá tí, halda teir fast um avtaluna, sum vit gjørdu í januar mánaði, vísir Kristian Magnussen á.*

*Mynd: Savnsmynd*

Eitt týskvøld fyri góðum mánaði síðan segði ein avgjørdur Kristian Magnussen í Degi og viku, at hann metti tað vera ábyrgdarleyst av samgonguni at lata ein skattalætta á komandi fíggjárlóg, tá landskassin var mikið sperdur.

Fíggjarlógaruppskotið hjá Bárði Nielsen og samgonguni eru nú lagt fram, og ein skattalætti á 60 mió. krónur er millum ætlanirnar hjá ABC-samgonguni fyri fíggjarárið 2005. Vit hava spurt formannin í tingbólki Javnaðarfloksins, Kristian Magnussen, um hann hevur broytt støðu í málinum um skattalættan hjá samgonguni.

### Óbroytt

Kristian Magnussen sigur, at hann hevur framvegis ta støðu, at tað er skeivt at veita ein skattalætta komandi ár. Hann ásannar kortini, at hann stendur rættiliga einsamallur í málinum.

– Tað eru eftir øllum at døma fá, sum halda tað sama sum eg, tí væntandi verður ein skattalætti latin komandi ár. Eg havi roynt at gjørt vart við míni sjónarmið í samgonguni, men eg fái ongan stuðul, og tá er ikki nógv, eg kann gera, sigur Kristian Magnussen

Formaðurin í tingbólki Javnaðarfloksins sigur, at hinir samgongulimirnir halda fast um samgonguavtaluna frá januar mánaði í ár, og tí eru teir ikki at vika í málinum

– Vit eru noydd at stinga fingurin í jørðina og ásanna, at búskaparliga støðan er ikki hin rætta til at veita ein skattalætta, og hóast eg havi roynt at greiða hinum samgongulimunum frá tí, halda teir fast um avtaluna, sum vit gjørdu í januar mánaði, vísir Kristian Magnussen á.

### Eingin kreppa

Kristian Magnussen heldur, at tær 60 mió. krónurnar, sum ætlanin er at lata í skattalætta í 2005 áttu heldur at verðið nýttar til at lække um hallið á fíggjarlógini.

– Vit mugu leggja okkum í geyma, at vit framvegis ikki hava eina kreppu í Føroyum, men talan er hinvegin um normalar tíðir. Hóast prísirnir ikki eru av teimum bestu í løtuni, so fiska vit nógv. Vit áttu tí heldur at brúkt pengarnar, ið fara til skattalætta, til at minka um hallið, sum er alt ov stórt, tá hugsað verður um, at føroyska samfelagið ikki er í eini kreppu, sigur Kristian Magnussen